sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postbox 3279,
Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

Dagfesting: 31. januar 2024
Journal nr.: 21/23465-10
Viðgjørt: HH

BUMR - Hoyringar - svar til uppskot II. --Fólkaskúlalógin januar 2024

Viðmerkingar frá Sernámi:

Eingin ivi, at hetta er gongd leið, sum vit kunnu gleðast um, men umráðandi at halda fast í, at hetta er fyrsta stig í at styrkja fólkaskúlan og møta tørvinum í fólkaskúlanum.

Tað er ikki vist, at ein floksstødd á 20 næmingar í nøktandi mun fer at røkka tørvinum hjá børnunum á bæði fakligum, sosialum og individuellum stuðli annars. Tí er eisini innan stutta tíð tørvur á at hugsa inn fleiri tímar til eitt nú flokslæraraleiklutin. Tað er gleðiligt, at verandi broytingaruppskot tekur hædd fyri hesum í møguligum komandi broytingum, tí hetta má ikki gloymast. Børnini hava í dag ov lítið av vaksintíð, og eitt slíkt átak kann hugsast at bøta um ein part av trivnaðaravbjóðingunum í føroyska fólkaskúlanum.

Harumframt verður møguleikin at minka um floksstødd vónandi bert ein møguleiki og ikki eitt krav. Broytingaruppskotið leggur upp til hetta sum eitt boð uppá, hvussu man kann loysa avbjóðingarnar við floksstødd.

Tvílæraraskipan ella námsfrøðiligir tímar kunnu síðani verða settir inn flokkin, heldur enn at býta hann í tveir, skuldi næmingatalið komið upp um 20. Eins og broytingaruppskotið leggur fram, kunnu tað gerast ógvuliga sárbærir barnabólkar í mun til næmingasamanseting við at hava 10 næmingar í einum flokki og 11 í hinum.

Tí er vónin hjá Sernámi, at orðingin eisini frameftir verður vegleiðandi og ikki definerandi, soleiðis at man í lógini tekur hædd fyri at varðveita møguleikan fyri at skapa eina dynamiska rammu, ið tekur hædd fyri tørvinum hjá ikki bert einstaka næminginum, men eisini einstaka flokkinum.

Tá sett verður inn við so nógvum resoursum, har vit koma at hava tveir fakpersónar til flokkar omanfyri 20 næmingar, so má førleikamenning eisini takast við her, soleiðis at styrkjast kann um hetta samstarvsarbeiðið.

Umráðandi er tó eisini at hugsa um teir flokkar, sum ikki eru komnir á 20 næmingar, at her eisini kann verða tørvur á meir starvsfólkaorku í ein ávísan mun. Vit hava í dag flokkar, sum liggja niðanfyri hetta tal, og hava tað sera trupult av ymiskum orsøkum.

Vinarliga

Sernám

Harriet Hansen
Varastjóri

SERNÁM
Á FRÆLSINUM 32 . POSTRÚM 2036 . FO-110 TÓRSHAVN . TLF 360200 . FAX 310196 . SERNAM@SERNAM.FO . WWW.SERNAM.FO